Árni Skaale
Steffan Klein Poulsen
Erhard Joensen
Eyðdis Hartmann Niclasen
løgtingsmenn

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 53/2022: Uppskot til løgtingslóg um grundvatn

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 12, stk. 4 verður orðað soleiðis:
   "*Stk. 4.* Eigarin skal hava boð um arbeiðið 4 vikur undan, at arbeiðið ætlandi byrjar. Fæst ikki semja við eigaran, kann ætlanin verða viðgjørd sum ognartøka eftir § 13."

2. § 12, stk. 5 verður strikað.

Viðmerkingar
Til nr. 1
Eigarin skal hava boð um arbeiðið 4 vikur undan, at arbeiðið ætlandi byrjar. Fæst ikki semja við eigaran, kann ætlanin verða viðgjørd sum ognartøka eftir § 13 í uppskotinum. Hetta merkir, at tað áliggur myndugleikanum at royna semju við eigaran. Um tað ikki eydnast, má farast eftir reglunum um ognartøku sambært grein 13.

Til nr. 2
§ 12 stk. 4 og 5 verður umorðað og samanskrivað. Tískil verður stk. 5 strikað.

Á Løgtingi, 17. mai 2023

Árni Skaale Steffan Klein Poulsen

Erhard Joensen Eyðdis Hartmann Niclasen